# Kjak



**Levi Mørk, leiðari**
*KLUBB 188*

## »Ein varði hjá ungdómi okkara er brotin niður og má byggjast uppaftur«

*Tað vóru ikki góð tíðindir sum komu fram í miðlunum í gjár á miðdegi, at okkara ungdómsportalur MESS.FO, má logga niður!*

Eg hoyrdi um Mess.fo gjøgnum miðlarnar fyri uml. 1½ síðani.

Eg fór beinanvegin at hyggja at hesum framúrskarandi átaki fyri teimun ungu. Jú rætt var. Her var virkuliga nakað stórt komið til. Fyri fyrstu ferð var ein ungdómsportalur gjørdur til tey ungu í Føroyum, sum hevði alt innihaldi til tey ungu.

Eg var totalt yvirraskaður av tí innihaldinum, sum mess.fo bjóðaði fram, bæði myndir, myndarøð, list, tónleikur, lýsingar, leinkir til aðrar síður, filmar, tøkni, fartelefoni og um alt tað nýggja til tey ungu og møguleiki fyri kjaki. So har var alt.

Vit hava brúkt mess.fo tvær ferðir ókeypis. Fyrstu ferð var, tá ið við byrjaði ungdómsvirksemi í mars í ár og aftur nú, tá ið vit fingu nýtt navn til okkara ungdómsvirksemi í Hoyvík KLUBB 188.

Eitt annað sum vit eisini brúkti mess.fo til var, at vit sluppu at lýsa ókeypis undir *tiltøk um vikuskifti*. Henda frálíka tænastu og hjálpsemi frá teimum aftan fyri mess.fo er nú burtur blivin.

Hvørjaferð vit hava havt opið her 2 ferðir um vikuna stendur okkara vitjandi ungdómar og loggar seg inn á heimasíðuna hjá www.mess.fo fyri at finna tað seinasta nýggja. Síðani fara tey ungu inn á YouTube.com.

Hesin møguleiki er nú ikki tilstaðar, og er hetta eitt stórt afturstig fyri tey ungu, her hjá okkum í Tórshavnar kommunu og kring alt landið. Tí her fer nógv arbeiði og kompetansa burtur, um okkurt ikki verður gjørt fyri at bjarga hesum framúr góða ungdómsportali

Ja, eg standi eftir við hesum orðum »Ein varði hjá ungdómin okkara er brotin niður«, og tað er sera umráðandi, at hesin varði verður bygdur upp aftur beinavegin. Tey sum fara at merkja hetta er tey ungu sjálvi og partur av teirra sannleika dettur burtur.

Hetta stendur á lesa á www. mess.fo eg loyvið mær at endurgeva "Um eitt samdøgur - aftaná út við 7.000 greinir og 300 ummælir, yvir 450 myndarøðir og 300 filmar - gerst mess.fo óvirkin.

### Trúgvar brúkarar

Mess.fo bleiv virkin 13. mars 2009. Undirtøkan hjá brúkarum hevur verið góð, og síðan í summar hevur mess.fo havt umleið 5.000 brúkarar, sum fast hava vitjað síðuna hvørja viku.

Men nú letur mess.fo so aftur av figgjarligum orsøkum.

- Tað kann tykjast løgið, tí vit hava verið væl nøgdir við gongdina hjá heimasíðuni, og hava afturmeldingarnar frá okkara brúkarum verið sera góðar, sigur Rógvi Róin.

### Neyðugt við ungdómsmiðlum

Rógvi Róin nevnir serliga undanfarnu viku - viku 40 - sum eitt tekin um týdningin, sum mess.fo kann hava fyri ungdómin. Hesa vikuna var mess.fo sambært Gallup tann føroyska heimasíðan við triðmest sýndum síðum (159.075) - bert yvirgingin av Portalinum og sel.fo.« Endurgeving endar

Eisini er hetta eitt stórt afturstig fyri okkara ungdómsarbeiði hjá Tórshavnar kommunu, tí kommuna hevur ikki sjálv ein tílíkan ungdómsportal. Sama er galdandi fyri alt landið. So vónandi kann land og kommunur, sláa seg saman og stuðla hesum frálíka arbeiði, sum ungdómsportalurin. www. mess.fo.

Vit hava fleiri aðrar góðar ungdómsportalar í Føroyum, td. www.gaming.fo og tann nýggi www.tónleikur.fo. Sum eisini eru góðir ungdómsportalar, men teir hava lagt dent á eina vøru.

Meðan Mess.fo er ein sera breiður og við innihaldsríkum tilfarið til tey ungu, sum nøktar allan tørvin hjá teimun ungu í okkara nýmótanst samfelag.

Vónandi opnar hesin portalur aftur, soleiðis at tey ungu kunnu og vit kunnu byggja víðari uppá henda ungdómsvarða.

---



**Meinhard Jensen**
*Gøta*

## Líkindi fyri, at tú stuðlar terror: 1:6

*Mánadagin hevði undirritaði eina harðmælta heilsan til fiskimenn á vagaportal. fo. Hendan er til limirnar hjá Samtaki, og tað kann væl vera tygum, lesari.*

Søgan er tann, at formaðurin í Føroya Fiskimannafelag hevur latið føroyingar halda, at ein maður, sum gav felagnum alt sítt vaksna arbeiðslív, er brotsmaður. Ákæran til fiskimannin er, at hann betalir pengar og gevur sítt mandat til FF, tá hann meldar seg inn í felagið og betalir síni prosentir. Man kann ikki tala at, hvørja ferð man er ósamdur, men nú hevur Jan Højgaard gjørt ting, sum ikki kunnu klassifiserast sum annað enn illgerðir (óndskapur), og hetta hevur oyðilagt heilt øgiliga nógv fyri ein mann, sum hevur betri uppiborið. Hevði Jan Højgaard komið út og sagt umskylda og sagt, at hann hevur ongar ákærur um brotsverk, so var tað úti av verðini. Men ákæran stendur við – og man veit, at tað er onki í henni, millum annað tí at Jan Højgaard hevur funnið upp á, at álopni maðurin hevur medvirka til innbrot. Hetta oman á alt hitt, sum er í hesum, og tað er ikki bara tað, at Jan Højgaard uttan nakran rætt burturvísti sakleysan mann, sum hevði verið í 35 ár hjá felagnum og hevði uppiborið eina tøkk fyri tíðina. Annað er so tað, at tað skal eitt frostbitið hjarta til at vera so kaldur fyri einum manni, sum hevur havt ríkiligt at dragast við.

So fúlheitirnar eru øgiligar.

Hetta er eitt arbeiðsmarknaðarmál eisini, tí at talan er um ein av fremstu fakfelagsmonnunum hjá okkum. Fakfeløg liva av solidariteti og stuðuli. Tú meldar teg inn í eitt fakfelag, betalir pengar til tað, og tú gevur títt mandat til hesi fólkini, tá tað kemur til samráðingar og annað. Tá leiðararnir úttala seg, gera teir tað vegna teg, og teir gera tað við tær sum vekt aftan fyri seg. Av tí at tín solidaritetur og tín rødd og tínir pengar – av tínum egna vilja – eru eksistensgrundarlagið hjá sovorðnum fólkum, so eigur tú at tala at, tá tey forbróta seg. Tí er tað superkritisabult, at fiskimenn onki gera við Jan Højgaard.

FF er í Samtaki, har sum Føroya Arbeiðarafelag og trý onnur feløg eisini eru limir. Góðir 8000 limir. Og Samtak bakkar Jan Højgaard upp. Eisini tey standa við ákæruni í peikifingrinum, um at maðurin er brotsfólk. Eisini tey vilja verjuleysum manni ilt og geva tí ónda vælsignilsi. Tað er ein sættapartur av Føroya fólki. Tí er tað 1/6 møguleiki, at tað eru tínir pengar og tín rødd og tín solidaritetur, sum eru við til at gera enda á einum manni, sum onki skeivt hevur gjørt. Tekur tú ikki røddina og pengarnar og solidaritetin frá teimum ella biður tey lata vera, so ert tú, antin tú heldur tað ella ikki, antin tú vilt tað ella ikki, sekur í yvirgangi.